# BILAR

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800




# Brandbilar til bø og haga



*Kartni Jacobsen, sløkkiliðsleiðari, við báðum Polaris Ranger 4x4 brandbilunum. Leggið til merkis ar forrúturin kann latast upp*

Tórshavnar Sløkkilið hevur fingið tveir brandbilar, tveir sonevndar ATV (All Terrain Vehicles), sum kunnu koyra í bø og haga.

Kartni Jacobsen, sløkkiliðsleiðari, sigur, at bilarnir skulu nýtast í smáu bygdunum í Tórshavnar kommunu. Teir eru útgjørdir við tí mesta sum hoyrir til ein brandbil sum t.d. vatntanga, hátrýstpumpu við skúmi, útrykninsljósum og sirenu.

Bilarnir eru amerikanskir, av slagnum Polaris Ranger 4x4, sum eru uppbygdir til brandbilar hjá Rosenbauer International í Eysturríki. Teir hava ikki vanligan girkassa, men bert høg og lág gir, umframt bakkgir.

Fyrimunurin við hesum bilum er at ístaðin fyri at draga sløkkiamboðini á einum vogni, er nú alt í einum væl útgjørdum bili, sum kann koma fram allastaðni, sigur Kartni Jacobsen.

*mg*



*Bilarnir eru sonevndar ATV (All Terrain Vehicles), sum kunnu koyra í bø og haga*



*Bilarnir eru útgjørdir við tí mesta, sum hoyrir til ein brandbil*



*Ein flottur showbilur verður við á festivalinum*

# Trucker Festivalurin framskundaður

Trucker Festivalurin, sum vanliga er í august, er framskundaður til fyrst í juni. Sum nakað nýtt verður ein flottur showbilur við á festivalinum.

Eins og í fjør verður Trucker Festivalurin í Klaksvík, men hesaferð verður hann 6-7 juni, ístaðin fyri í august, sum hevur verið vanligt.

Ein orsøkin til at festvalurin er framskundaður er, at tað er eydnast fáa fatur á einum sonevndum showbili til festivalin í juni. Bilurin hevði ikki kunna komi í august, tí tá er størsti truckerfestivalur í Norðurlondum, Nordic Trophy. Eisini hevur ynski verið frammi um at hava festivalin á Norðoyastevnu. Hetta er gjørt í samráð við Carsten Nielsen (sum eigur showbilin), Klaksvíkar Býráð og NFÍ.

Í sambandið við at Trucker Festivalurin tekur hendan showbilin heim, hava fyriskipararnir eina sms-kapping (lutaseðil) koyrandi við hópin av vinningum. Lutaseðil kann ognast við at senda "lastbil" til 1919. Hvørt sms-ið kostar 15 krónur + vanligan sms takst. Vinningarnir er at síggja á: www.trucker.fo

Tilmeldingin fer fram á tel. 281992, 590260 ella við at senda teldupost til: hugo@trucker.fo, leif@trucker.fo